# Rock úr at gera

Á lemmavirkinum Rock í Vági hava teir úr at gera í hesum døgum. Í síðstu viku var ein stórur grønlendskur trolari á Vági eftir nýggjum lemmum frá Rock, og í gjár hevði aftur ein grønlendskur trolari ørindi í Vági. Hesaferð var tað trolarin Qaqqatsiaq, sum kom við lemmum, ið skuldu umvælast. Hans J. Joensen, stjóri á Rock, sigur við Suðuroyarportalin, at teir hava fingið fimm mans á virkið afturat. Av teimum eru tríggir lærlingar.

# Nýggjur línukastari

Við góðari hjálp frá øðrum hevur Andras Samson ment ein nýggjan línukastara, sum er ætlaður til at skjóta eina línu millum tvey skip. Línukastarin, sum stendur fastur á dekkinum, er serliga ætlaður partrolarum at skjóta línu sínamillum, og eitt par hevur longu roynt hann við góðum úrsliti, skrivar Norðlýsið. Tað er Vónin í Fuglafirði, sum stendur fyri marknaðarføringini, og har hava tey góðar vónir um, at áhugi verður fyri tólinum.



*Millum tey mongu kendu andlitini (ella høvdini) sum hava verið í salongini er danski skemtarin, Dirch Passer. Helst er onkur skemtisøgan søgd her*

**Høgur og lágur yvir ein kamb**

At kunna tosa við bæði høgan og lágan, kendar og ókendar menn er ein eginleiki sum Eigil hevur.

Hjá honum hava sitið bæði løgmenn, tingmenn, stjórar, arbeiðsmenn, gøtusóparar, sjómenn og mong onnur.

Millum teir meiri kendu menninar, sum Eigil hevur gjørt hárið hjá, er danski skemtarin, Dirch Passer sum vitjaði her í mars mánaði 1978.

- Ja, typurnar eru so ymiskar. Summir tosa nógv, meðan aðrir tosa minni. Her skal ein vera hálvur psykologur, ein má hava gott minni, og vita, hvat ein skal siga, og ikki minst, nær ein skal siga tað.

- Ein má líkasum duga at lodda dýpið hjá hvørjum einstøkum kunda.

Fyrr máttu fólk koma inn, og seta seg at bíða til tað var teirra tørn. Men seinni var hetta broytt, soleiðis at fólk máttu biðja um tíð frammanundan.

Hetta var ein meiri praktisk loysn fyri Eigil, men hevði eisini aðrar broytingar við sær: Nú var kundin einsamallur inni saman við hárskeranum.

- Nú kemur ein líkasum tættari uppá fólkini. Fyrr var ofta meiri lætt tos, tí einir 10 mans sótu í sama høli og bíðaðu.

- Í dag er ein uppgáva at fáa fólk í gott lag. Ein má hugsa um hvønn einstakan kunda, og kunsturin er tí eisini at minnast til, hvat vit tosaðu um seinast, greiðir Eigil frá.

Her kunnu koma menn sum við gleði greiða frá, at nú er dótturin gift, at teir skjótt skulu gerast pápar ella abbar, meðan aðrir greiða kanska frá meiri tyngri persónligum viðurskiftum.

- At arbeiða sum barberur er ein balansugongd, har ein má kenna tann einstaka kundan.

- Ein má snøgt sagt duga at taka hensyn, sigur Eigil.



*- Eg havi havt nógvar góðar og trúfastar kundar, sigur Eigil*

av. - Bæði í 1957 og í 2006 eiga vit politikarar, sum vit hava okkara hugsan um. Teir kann ein so altíð skelda inn á, sigur hann við einum brosi.

**Altíð í góðum lagi**

69 ára gamli Djóni hevur siglt úti sum stýrimaður í mong ár, men gavst við hesum í 1997.

Tá hann var heima millum túrarnar, hevur hann havt fyri neyðini at klippa sær. Tá hevur hann altíð vitað, hvar hann skuldi fara fyri at fremja hesi ørindini.

Fyrr mátti tú møta í góðari tíð, og so bara sita og bíða eftir at tú átti tørn fyri klipping. Men tey seinnu nógvu árini hevur verið neyðugt at bíleggja sær tíð frammanundan.

- Tað hevur altíð verið pláss fyri mær. Eg havi bara ringt, og sum oftast eri eg sloppin framat beinanvegin, - í øllum førum sama dag!

Hóast Djóni hevur klipt sær hjá Eigili í samfull 49 ár, hevur hann lagt merki til – og glett seg um! - ein sera góðan eginleika hjá Eigili: Lagið.

- Eg veit ikki, hvussu tað ber til. Men Eigil er altíð altíð í góðum lagi. Eg trúgvi ikki at hann nakrantíð hevur verið í ringum lagi, meðan eg havi verið her.

**Ergriligt at gevast**

Djóni telist millum seinastu kundarnar hjá Eigili. Tað harmast hann um.

- Eg skilji á lagnum, at hann fer at gevast skjótt, - tja, eg veit ikki. Mær dámar tað lítið, skal eg siga tær, sigur Djóni.

Hann leggur dent á, at 70 ára gamli Eigil er í góðum árum, og tí kundi hann hildið á í mong ár aftrat.

- Hinvegin, - so ger aldurin væl tað, at vit øll einaferð mugu gevast!

- Ja, ja, brýtur Eigil hann av. – Eg taki bara ein dag í senn. Men tað er sjálvandi altíð ergriligt at gevast, tá hugurin er til at halda fram.

- Jamen, eg veit ráðini, svarar Djóni. Eg kann bara seta ein stól fram í kjallaran hjá mær. So kanst tú koma heim til mín at klippa!

**Túsund høvd**

Tann stóri spurningurin er, hvussu mong høvd ið Eigil hevur klipt hesi mongu árini.

Sjálvur hevur hann ongatíð roknað tað út, men hann veit at talan er um túsundtals og aftur túsundtals viðskiftafólk.

- Hvat sigur tú? Eini 10 í miðal um dagin?! Áhnei, 10? Mangt slíkt. Tað klári eg longu áðrenn fyrrapartskaffið, sigur Eigil við einum brosi.

Fyri Eigil hevur tað havt sín týdning, at menn sum Djóni og hundraðtals aðrir hava klipt sær regluliga hjá honum.

- At teir koma aftur og aftur má vera eitt tekin um, at teir eru væl nøgdir – ja, og væl kliptir!

- Helst skuldu teir komið inn í góðum lagi, og framvegis vera í góðum lagi, tá teir fara útaftur!

**Ræðist sjóverk**

At Eigil yvirhøvur kom til Føroyar í november mánaði 1957 var meiri at kalla av tilvild.

Hann var útlærdur hárskeri og hevði eitt sonevnt summararbeiði sum hárskeri í Danmark. Men hann ynskti sær eisini arbeiði um veturin.

Tá var ikki so lætt at útvega sær eitt arbeiði. Hann sá eina lýsing um eitt arbeiði í Føroyum, søkti og fekk arbeiðið. Og hann kundi byrja beinanvegin!

Í november mánaði legði hann so til havs við Dr. Alexandrinu til Føroyar. Hetta var ein ringur túrur, har nógv ferðafólk spýðu meginpartin av túrinum. Fram kom hann kortini, hóast túrurin ikki var serliga góður.

Eigil fór beinanvegin til arbeiðis henda novemberdagin í 1957. Fyrsti kundi hansara var Djóni Thomsen, sum síðani hevur verið fastur kundi her.

Ætlanin hjá Eigili var at fara til Danmarkar aftur at arbeiða í mai mánað árið eftir, men so varð ikki.

- Onkur hevur sagt seg vita orsøkina til, at eg framvegis eri her: Tey siga, at eg tori ikki niður til Danmarkar aftur, tí eg eri so ringur í sjóverki!

- Men eg havi havt tað gott her. Havi havt sløk 50 góð ár her í Føroyum, sigur Eigil.